# Rockurin rungaði á Eystanstevnu












**Tríggir føroyskir bólkar spældu á útikonsert í Saltangará fríggjakvøldið. Umstøðurnar at spæla vóru góðar, men tað tók sína tíð, áðrenn lív kom í konsertina**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Diatribes, Clickhaze og Týr spældu á útikonsert, sum varð hildin í sambandi við Eystanstevnuna um vikuskiftið. Konsertin var fríggjakvøldið, og teir tríggir føroysku rockbólkarnir gjørdu sítt besta fyri at skapa eina góða konsert.

Tað var súra uppgávan hjá Diabtribes at hita upp fyri hini bæði kendaru nøvnini, men tað gjørdu teir samvitskufult við góðum tónleiki og nógvari orku.

Konsertin byrjaði fyri midnátt, men tað var sum vanligt trupult at savna fólk fyrr enn seinni úti á náttini. Diatribes legði tó harðliga fyri. Teir spæla rocktónleik, sum líkist tí slagnum av rocki, sum floymir úr USA í hesum døgum. Tað er melodiøst, men eisini við eitt sindur av broddi í.

Diatribes spældi væl, og tað var spell, at fleiri fólk ikki fingu høvi at hoyra hendan bólkin. Teir eru ikki enn eins kendir sum Clickhaze og Týr, men teir kunnu fara at gera meira um seg, halda teir fram í sama lagi komandi árini.

## Bangin fyri amerikumonnum

Clickhaze var mest aktuelli bólkurin á konsertini, tí fríggjadagin kom fyrsta útgávan hjá teimum. Clickhaze hevur verið nógv frammi umvegis Prix Føroyar tónleikakappingina og konsertir heima og uttanlands, men nú er fyrsta útgávan hjá bólkinum umsíðir komin.

Tað vóru eisini sangir av hesi útgávu, sum vóru á skránni í Saltangará fríggjakvøldið. Bólkurin spældi teir kendu sangirnar, og teir trivu eisini í tveir spildurnýggjar sangir, har tað bar til at staðfesta, at Clickhaze hevur framvegis nógv listarligt avlop til gera nýtt tilfar.

Ein av stóru løtunum hetta kvøldið var tó, tá bólkurin spældi sangin I´m Afraid of Americans, sum David Bowie hevur skrivað. Hesin sangurin er ein melodiøsur og spennandi rocksangur, sum Clickhaze dugir væl at tulka.

Eivør Pálsdóttir og Petur Pólson røktu sína uppgávu sum sangarar til fulnar, og tey høvdu góðan botn at byggja á.

Eivør hevur nú fingið sær eitt meira popput image, enn hon hevur havt seinastu árini. Hon er farin frá kjólum til buskir og troyggir, og tað riggar eisini væl til tónleikin hjá bólkinum.

## Týr og kvæðini

Seinasti bólkurin á konsertini var Týr, sum saman við Clickhaze hevur gjørt nógv um seg uttan fyri landoddarnar farna árið. Týr hevur serliga vunnið seg fram í Íslandi, men seinni í ár fáa teir møguleikan at gera tað saman í Danmark og Noregi.

Týr spældi millum annað sangir, sum teir góvu út á fløguni How far to Asgaard. Tað vil siga, at Ormurin langi sjálvandi eisini var á skránni. Harafturat er Týr eisini farin at fjasast við annað kvæði, og tað tykist, sum tað er júst hetta, sum fólk vænta at hoyra frá Týr.

Hóast teir gera frálíkan rocktónleik, har partar nærkast klassiskari inspiratión, so er tað serliga Ormurin langi, harða gittarljóðið og solospøl, sum hava givið Týr tað støðu, sum bólkurin hevur millum ungar føroyingar.

Týr spældi væl, Pól Arni var góður við mikrofonini, og fólk vóru sjálvandi ovurfegin, tá tey fingu møguleikan at taka saman til Ormin langa.

Tað vóru sløk 500 fólk til konsertina, og hóast tað er á góðari leið, so hevði konsertin uppiborið, at tað vóru fleiri fólk.

# ítróttur

Nr. 114 • mikudagur • 19. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tvær royndir og tvey 13 tøl

**Fyrireikingarnar til og avgreiðslurnar av FM kappingunum hava ongantíð verið betri, enn tær hava verið í ár, og nú verður vónað, at kappingin millum vertirnar um at vera í minsta lagi eins stinnir og hinir fer at síggjast aftur kring alt landið**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Formaðurin í Róðrarsambandinum heldur, at fyrireikararnir higartil eiga toppkarakter fyri avrik síni*

Tað gekk upp á stás við kappróðrinum á Skálafjarðarstevnuni. Tað kemur ikki ofta fyri – rættari er at siga, at tað kemur sera sjáldan fyri – at fyrsta startskotið er ásettu klokkutíðina. Men soleiðis var tað leygardagin. Sekundvísarin var ikki farin nógv av trítalinum, tá fyrsta skotið hoyrdist inni á 1000 metra málinum, og klokkan var akkurát farin av fimm, tá 10–mannaførini komu á mál.

– Eg tosaði við høvuðsdómarin beint eftir kappróðurin. Hann helt fyri, at tað hevði verið sum eitt spæl, so væl høvdu fyrireikararnir lagt alt til rættis. Á dráttinum varð skundað undir manningarnar um at vera skjótar inn á málið, alt tað tekniska var í lagi, og manningarnar vóru lættar at hava við at gera, sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum.

Hann heldur, at fyrireikararnir eiga toppkarakter fyri fyrireikingarnar, og hann heldur, at klaksvíkingar vóru eins óførir:

– Tað regnaði leygardagin, men annars vóru líkindini av teimum bestu. Líkindini vóru ikki góð í Klaksvík, men tað eydnaðist teimum væl at fáa alt frá hondini. Næsti róðurin verður í Hósvík. Parturin hjá teimum plagar ikki at liggja eftir. Tí rokna vit við og vóna, at tað eisini komandi leygardag fer at ganga væl. Og tað hevði ikki verið so galið, um tað so at siga hevði komið kapping millum stevnuplássini um at vera bestir til fyrireikingarnar, heldur RSF formaðurin.

Í blaðnum leygardagin varð nevnt, at tað fleiri ferðir hevur verið róðrinum til ampa, at bátar, sum einki hava havt við kappróðurin at gera, hava ligið og stimað aftur og fram. Hesa ferð vóru eingir trupulleikar av hesum. Brimil, sum hevði luttikið í bjargingarroynd, lá dygst uttanfyri róðrarøkið, og tað hevði ivaleyst verjukenda ávirkan, og so kann tað væl hugsast, at tað hava verið fleiri, sum hava tikið áheitanina til eftirtektar at vísa róðarfólkunum størri virðing fyri tað stríð, sum tey leggja í kappróðurin.

Í onkrum róðrum hevði onkur bátur trupulleikar í startinum, og í onkrari aðrari kapping stýrdi onkur skeivt. Men tá vit vóru í sambandi við Róðrarsambandið mánadagin var eingin kæra komin um róðurin á Skálafjørðinum.

## Møguleiki fyri flyting

Mánadagurin í hesi vikuni minti á, at sjálvt um tað er komið til longsta dag, so nýtist veðrið ikki at skikka sær so væl, sum tað skuldi roknast við hesa ársins tíðina. Mánakvøldið mundi kappróðrarvenjingin kring landið verða avlýst. Tað stóð um húsbrot, og tað var sannur uppgangur nógva staðni.

Hvat gera tit, um líkindini verða soleiðis leygardagin, sum tey hava verið fyrsta partin av vikuni?

– Tað hevði verið óforsvarligt at havt kappróður undir sovornum umstøðum. Vit hava møguleika at útseta róðurin til sunnudagin, men vónandi verður tað ikki aktuelt. Tá veðrið hevur verið so vánaligt fyrst í vikuni, mugu vit vóna, at tað fer at roynast betri leygardagin, sigur Hannis Joensen.

Bæði í Klaksvík og í Runavík vóru veðurlíkindini og harvið eisini róðrarlíkindini betri seinna stevnudagin, men tað kom ongantíð upp á tal at útseta kappróðurin.

# Seks feløg vunnu hvør sína kapping

**Serliga hugaligt var tað, at Suðuroyggin, sum áður var millum fremstu økini, kom aftur á kortið í kappróðrinum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Kappróðurin á Skálafjarðarstevnu var væl eydnaður, og hann var í fleiri av kappingunum rættuliga spennandi. Sammett við á norðoyarstevnu vóru tveir nýggir vinnarar. Teir vóru 6–mannafarið Smyril úr Vági við monnum og nýggja 8–mannafarið Kvívíkingur.

Hinir fýra vinnararnir vóru teir somu sum í Klaksvík. Genturnar umborð á Sílinum og kvinnurnar umborð á Jarnbardi vunnu so sannførandi, at tað eftir tvær tær fyrstu kappingarnar er ilt at ímynda sær, at hesar manningarnar skulu verða hóttar seinni í summar.

Eysturoyingurin og Fípan Fagra við dreingjamanning hava vunnið bæði í Klaksvík og í Runavík. Felags fyri sigrarnar hjá hesum báðum manningunum er, at munurin aftur til næstu bátarnar hesa ferð var lítil. Tí eigur tað ikki at vera óhugsandi, at tað í næstu kappingunum fer at vera sera stórur spenningur í hesum kappingunum.

## Seks feløg

Sammett við undanfarin ár tykist býtið av sigrum til ymsu økini kring landið at vera javnari í ár. Hesa ferð vunnu klaksvíkingar ein róður, Runavík vann ein róður, Kvívík vann ein róður, Vágur vann ein róður, og Havnar Róðrarfelag og Róðrarfelagið Knørrur, sum bæði eru í Havnini, vunnu hvør sín róður.

Klaksvíkingar vunnu nógv í fjør, og Kappróðrarfelagið NSÍ hevur í mong ár verið millum tey feløgini, sum oftast hava vunnið. Kvívíkingar hava ofta verið fremstir, og feløgini í Havnini liggja oftast frammarlaga.

Mest merkisverda úrslitið í Runavík var tað, at Smyril úr Vági við monnum var fremstur. Suðuroyingar vunnu í seksti árunum nógv, men síðani hevur tað ikki roynst so væl. Síðsta FM heitið, sum vágbingar hava vunnið, var í 1994, tá 5–mannafarið Royndin Fríða, mannað við dreingjum, var best.

Ofta hevur tað víst seg, at tá manning úr øki, sum annars ikki hevur staðið seg væl, hevur megnað at stinga seg framum, so hevur tað havt við sær, at áhugin fyri kappróðri yvirhøvur í økinum er øktur, og tað hevur so sæst aftur í luttøkuni og kanska úrslitunum. Eftir sigurin hjá Smyrli á Skálafjørðinum verður vónað, at fleiri manningar úr Suðuroy fara at taka lut.

Á Skálafjarðarstevnuni var einki 10–mannafar og einki 8–mannafar úr Suðuroy við í kappingini. Umframt Smyril luttók Snopprikkur úr Hvalba í kappingini millum 6–mannafør við monnum. Hvalbiarbáturin luttók eisini í kvinnukappingini. Í gentukappingini luttók Royndin Fríða, og í dreingjakappingini var eingin bátur úr Suðuroy við. Merkisvert er tað, at eingin bátur yvirhøvur av Tvøroyri var við í kappróðrinum á Skálafjørðinum. Firvaldur – bæði við gentumanning og dreingjamanning – eru tilmeldaðir FM kappingarnar, men báðar manningarnar meldaðu frá til næstu FM stevnuna í ár.